# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Kaj Leo dumpaði longu fyrsta dagin

Talan var um ein boomerang av rang, tá Sambandsflokkurin í gjár gjørdi av, at Kaj Leo Johannesen, floksformaður skuldi taka við sum fíggjarmálaráðharri eftir Bárð Nielsen. Sum vit umrøddu her í oddagreinini í gjár, so hevði Kaj Leo bestu kortini á hondini at gerast landsstýrismaður, men vit gjørdu kortini vart við, at hetta fór at kosta Sambandsflokkinum ein tingmann.

Men hetta hava Kaj Leo Johannesen og floksfelagar hansara eftir øllum at døma ikki hugsað um. Tað vórðu býráðslimir Sambandsfloksins í Havn, Beate L. Samuelsen og Høgni Mikkelsen, sum saman við Kaj Leo Johannesen kravdu Heðin Mortensen úr Sambandsflokkinum, eftir at hann sambært teimum hevði svikið eina avtalu við Fólkaflokkin um, at Fólkaflokkurin skuldi varðveita borgarstjórasessin í Havn, heldur enn at Sambandsflokkurin aftur fekk sessin.

Alt hetta endaði við, at Heðin Mortensen varð koyrdur úr Sambandsflokkinum. Restina av søguni kenna vit - men hana átti formaður Sambandsfloksins eisini at kent – tí tykist tað sera ørkymlandi, at hann sum ketta úr høvdatrog seinnapartin í gjár viðgongur hendan trupulleikan – og enn verri ábendingar eru tað um politiskt tev og politiskt handalag, tá hann leggur trupulleikarnar upp í hendurnar á Jóannesi Eidesgaard, løgmanni.

Hurluvasin í Sambandsflokkinum í Havn er ein innanhýsis trupulleiki, sum løgmaður hvørki eigur lut ella deil í. Vil Sambandsflokkurin ikki missa ein tingsess – og tað skulu vit ikki siga hann ringan fyri, so er bara at seta onkran annan í Fíggjarmálaráðið, enn júst ein tingmann úr Suðurstreymoy. Hetta áttu tey at havt hugsað um longu í gjáramorgnunin!

Við Bárði Nielsen hevur Sambandsflokkurin mist nógv. Men um Kaj Leo Johannesen nú ger málið um Heðin Mortensen til samgongumál – ella setir løgmanni og samgonguni ultimatum hesum viðvíkjandi, so er tað byrjanin til endan á hansara politisku karrieru.

Sambandsflokkurin má tí broyta avgerðina um, at Kaj Leo Johannesen verður landsstýrismaður. Av tingmanningini eru tað bara Marjus Dam og Olav Enomoto, sum kunnu taka við sessinum.

Avgerðin hjá Bárði Nielsen gav Sambandsflokkinum ein trupulleika. Men loysnin hjá Kaj Leo Johannesen og hansara fólki var til greiðan dumpikarakter.

**Sosialurin**

## Skal politikkur nú vera sjónleikur

**JOHN WILLIAM JOENSEN**
Formaður í Norðoya Sambandsfelag



**Tað kann ikki koma upp á tal, at 16 tilvildarligir tinglimir sleppa at kollvelta føroysku valdømisskipanina beint undan einum løgtingsvali.**

Uttan at fara í smálutir við tí, sum ein kann meina um føroysku valskipaninna, so má eg harmast um, at løgtingsformaðurin í allari sínar tygn ikki longur hevur samband við okkum, sum dagliga húsast úti í valdømunum kring um í Føroyum.

At høvuðsstaðarmiðil hevur hegni til at fáa eina góða yvirskrift, kann eingin taka sær nær - men føroyskur politikkur kann tó ikki gerast reinur sjónleikur.

**Samgongan ræður**

Undir øllum umstøðum verður tað ikki andstøðan, sum kemur at leggja eitt slíkt mál fram, og sambært spurnarrundini hjá høvuðsstaðarmiðlinum eru einans níggju av 21 samgongulimum fyri at gera Føroyar til eitt valdømi.

Tað kemur ikki upp á tal, at eitt slík uppskot verður samtykt í tinginum, uttan at samgongan fyrst er samd um at bera málið niðan í tingið.

At Edmund Joensen er heitur talsmaður fyri uppskotinum er ikki so løgið, tí hann er einasti føroyski løgmaðurin, sum bleiv koppaður av sínum egna veljarafelag.

Leita vit so her norður til Karsten Hansen - so er hann einasti norðoyatingmaðurin, sum vil avtaka umboðan norðoyinga á tingi.

Hetta sigur okkum nokkso nógv um, hvørjar møguleikar norðoyatingmaðurin metir seg sjálvan hava at verða afturvaldur, nú hann so bráddliga gjørdist Jenisarmaður.

**Fólkið eigur at tala**

Skulu Norðoyggjar avtakast sum eitt valdømi, so eigur tað at verða gjørt, um fólkið, sum her býr vil tað.

Minsta kravið er, at politikkarar ella flokkar taka hetta evnið við í valskránna til eitt komandi løgtingsval. So kunnu veljarar stuðla teimum, sum eru fyri ella ímóti.

Tað kann ikki vera rætt, at fólkið als ikki sleppur at siga sína hugsan í einum so tíðandi málið, sum okkara valskipan jú er.

Politikkur eigur ongantíð at gerast sjónleikur - men fyri tað skulu fjølmiðlarnir hava loyvi til framhaldandi at fáa skemtiligar søgur burtur úr skiftandi meiningunum hjá politikarunum.

## Innlit í Tórshavnar Havn og flotvøllin á Glyvursnesi

**ÓLAVUR PETERSEN**

Havi í dag fingið innlit sum biðið varð um 26. apríl 2007 frá havnarmeistara Jónsvein Lamhauge, sum undirritaði við áhuga nú nærlesur.

Sum skilst hevur Tórshavnar kommuna og Tórshavnar havn umrøtt aðrar geografiskar møguleikar til tað virksemi, sum nú er tilætlað Signabø.

Hvørjir aðrir møguleikar eru umrøddir?

Vil heita á Tórshavnar kommunu um at fáa innlit í kostnaðin av havnarøkinum eystan fyri eystara gamla molan í Tórshavnar Havn. Íroknað spreinging og flutning av mió. av tonsum av gróti frá innanvert á Glyvursnesi, til brimbarda Skansatangan.

Av tí at Ólavur Hovsgarð, fyrrverandi skipari á Norrønu, í SvF sigur Norrønu ikki hava maskinorku til vanlig ring veðurlíkindi í Tórshavnar Havn, so heiti eg á Tórshavnar kommunu og Tórshavnar Havn um at handa mær úrslitið av kanningum sum veita trygd fyri at leggjast kann at á Signabø, tá líkindi ikki eru til tað í Havn. Vit skulu minnast til, at fjallarøðin í Streymoy er brotin av Kollfjarðardali, so opið er í Vestmannasund. So har eru hvirlur og kastivindar úr øllum ættum.

Meðan Poul Michelsen er borgmeistari og Heðin Mortensen býráðslimur, fái eg at vita frá Heðini Mortensen, at fyrsta byggistigið av havnarøkinum á Skansatanga fer í gongd uttan viðtøku av Tórshavnar býráð. Vil fegin hava at vita nær arbeiðið fer í gongd, og útskrivt við dagfesting um viðtøku í Tórshavnar býráð.

Til hvat er havnarlagið, millum fólk kallað Nyhavn, upprunaliga ætlað til?

Hví eru byggistigini út á fjørð slept? Orsøkin má hava áhuga, tí nyttuvirði av tí sum er gjørt, er nógv fallið í virði, nú ætlanin ikki verður fullførd.

Tað undraði meg stórliga í borgmeistaratíðini hjá Poul Michelsen, at ætlanin at byggja flogvøll á Glyvursnesi ikki varð tengd at farmaflutningshavn innanvert á Glyvursnesi.

Hvat hevur arbeiði við ætlanum um flogvøll á Glyvursnesi kostað Tórshavnar kommunu?

Hvat hava veðurkanningar undir skiftandi borgmeistarum um flogvøll á Glyvursnesi kostað?

Sambært innliti frá Tórshavnar Havn eru tað kollfirðingar undir leiðslu av Hans Jacob Hansen sum hava gjørt seg inn á Signabø, heilt inn á Ósabakka.

Annars hevur Høgni Johansen rætt í kjaki við Heðin Mortensen í SvF. Ikki fyrrenn í jan. 2005 vendir Tórshavnar havn sær til friðingarnevndina um kaikant, men longu í februar 2005 koma teir við ískoyti til útfylling á Oyrareingjum. Nú er projektið á einum heilt øðrum støði, enn tá kollfirðingar fingu grót úr Vágatunnlinum at seta "lættan" ídna á.

Hóast kunnandi fund í Kollafirði fyri tveimum árum síðan, so liggur veruleikin so langt frá tí upprunaliga, at tað er vakl skiljandi at kollfirðingar nú vakna sum við kaldan dreym.

*ois@petersen.mail.dk*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.